# Felagið Línuskip havt aðalfund



*Meðan fundirnir hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag vórðu hildnir í Havn, helt felagið Línuskip aðalfund á Bátasavninum í Leirvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Líggjas Johannesen úr Klaksvík ynskti ikki afturval, og í hansara stað varð Eirikur Olsen av Tvøroyri valdur. Formaður í felagnum er Rólant Poulsen**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið Línuskip hevði aðalfund á Bátasavninum í Leirvík í síðstu viku. Eins og Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag, heldur felagið Línuskip eisini aðalfund millum jól og nýggjárs, tí tá eru flestu fiskimenn heima.

Rólant Poulsen, formaður í felagnum, sigur, at fundurin var væl møttur.

### Fleiri skip

- Síðan ruddað varð upp millum bólkarnar við línuskipum, hoyra nú tilsamans 26 skip til hendan bólkin, og ofta møta bæði reiðarar og skiparar til fundar, tá ið aðalfundur er.

Hann sigur, at áður vóru 19 ella 20 skip í bólkinum, men síðan eru tey skipini komin aftrat, sum vóru í bólki 4.

- Skipini, sum komin eru aftrat úr bólki 4, eru eitt nú línuskip, sum eru "umgjørdir" útróðrarbátar, t.v.s. at fleiri fiskiloyvir eru løgd saman í tað eina. Nú eru vit soleiðis 26 skip í bólki 3, sum eru línuskip yvir 110 brt. Einir 13-15 mans eru umborð á hvørjum av hesum skipum, og soleiðis er hetta vorðin ein stórur skipabólkur við nøgvum arbeiðsplássum.

Rólant Poulsen sigur, at á aðalfundinum hevur hvørt skip eina atkvøðu, og limaskapurin kostar 5.000 krónur fyri hvørt skipið um árið.

### Eirikur nýggjur

Tveir limir í nevndini í Línuskipum standa fyri valið annaðhvørt ár og tríggir annaðhvørt ár.

Í ár stóðu soleiðis tveir limir fyri vali.

Líggjas Johannesen úr Klaksvík ynskti ikki afturval, og í hansara stað varð Eirikur Olsen av Tvøroyri valdur.

Teir, sum umboða nevndina í Línuskipum í dag, eru: Rólant Poulsen, Eiði, formaður, Jóhannes Olsen, Toftir, næstformaður, Torleif Sigurðsson, Klaksvík, kassameistari, Dánjal Jákup Vilhelm, Norðskáli og Eirikur Olsen, Tvøroyri.

Á aðalfundinum komandi ár standa Rólant og Jóhannes fyri vali, og Rólant Poulsen sigur, at tá ætlar hann at leggja frá sær sum formaður.

- Eg bjóðaði mær at fara úr nevndini á aðalfundinum næstseinast, tí eg hevði selt skipið, Morgunstjørnuna, men aðalfundurin ynskti tá, at eg helt fram. Men nú verður tað so bara hetta árið aftrat, sigur Rólant Poulsen.

Føroyskir línumenn:

# Burtur við norskum línuskipum á føroyskum øki

**- Vit halda tað ikki vera rætt, at føroysk línuskip skulu gjalda allan prísin fyri tann partin av føroyska fiskiskipaflotanum, sum fiskar av norskari kvotu eystanfyri, sigur formaðurin í Línuskipum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*





*Føroyskir línumenn vilja hava norsku línubátarnar úr føroyskum sjógvi. Hetta hava limirnir í Línuskipum álagt nevndini at arbeiða við*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Rólant Poulsen sigur, at tað, sum serliga var til viðgerðar á aðalfundinum hjá felagnum Línuskipum í seinastu viku, var sáttmálin millum Føroyar og Noreg, sum enn ikki er komin upp á pláss.

- Samráðingarnar millum londini bæði endaðu úrslitaleysar herfyri, men verða ætlandi tiknar uppaftur í Danmark mkudagin.

Hann sigur, at felagið Línuskip varð ikki umboðað við seinastu samráðingar, tí formaðurin var ikki heima. Tískil varð felagið umboðað av Føroya Reiðarafelag í staðin.

- Men nú samráðingarnar verða tiknar uppaftur, ynskja vit at verða við, og í dag verður fyrireikandi fundur millum føroysku umboðini, sum síðan verða við í samráðingunum, sum verða uppafturtiknar í Danmark mikudagin.

### Norðmenn burtur

Rólant Poulsen sigur, at limirnir í felagnum Línuskipum hava álagt nevndini at virka fyri, at norskir línubátar verða útihýstir á Føroyaleiðini.

- Vit halda tað ikki vera rætt, at føroysk línuskip skulu gjalda allan prísin fyri tann partin av føroyska fiskiskipaflotanum, sum fiskar av norskari kvotu eystanfyri.

Hann vísir á, at 12 norsk línuskip hava havt loyvi at veiða undir Føroyum í senn um árið, og tað heldur felagið Línuskip er alt ov nógv.

- Nú línuskipaflotin í bólki 3 er vorðin so stórur, hava vit brúk fyri teimum leiðum, sum norðmenn royna á, tá ið gýtingin er fyri, og nógvar leiðir eru stongdar.

Hann vísir á, at inntøkurnar hjá føroyskum línumonnum eru falnar nógv seinastu tvey árini, samstundis sum útreiðslurnar til eitt nú agn og olju eru øktar.

- Manningarparturin hjá okkum í fjør liggur um 280.000 krónur, meðan teir, sum sigla við flakatrolarunum og nótaskipunum, hava ein manningarpart, sum liggur um 450 og yvir 800.000 krónur. Tí duga vit ikki at síggja, hví vit skulu "bløða" fyri tað, sum flakatrolararnir og nótaskipini veiða í norskum sjógvi, sigur Rólant.

Hann vísir á, at norskir línubátar í 2004 eru skrásettir at hava fiskað 4.600 tons undir Føroyum, serliga av brosmu og longu.

### Ymiskar sømdir

- Umframt tað, sum vit kunnu fiska undir Føroyum, fáa vit nakrar túrar undir Íslandi, men oftast eru vit komin heilt út í mai, áðrenn vit sleppa til Íslands.

Rólant sigur, at Íslandskvotan gevur umleið 2 miljónir krónur til hvørt skipið - alt eftir, hvussu stóra kvotu skipini eiga har yviri.

- Vit halda tó, at djúpa vatnið undir Føroyum í gýtingartíðini hevði givið okkum meira enn hesar 2 miljónir krónurnar, um norskir línubátar tá ikki løgu á hesum leiðum og troyttu okkara grunnar.

Hann heldur eisini, at norðmenn sleppa alt ov lætt, tá ið teir fiska undir Føroyum, tí teir eitt nú kunnu skifta millum føroyskan sjógv og ES-sjógv á sama túri.

- Vit kunnu hinvegin ikki skifta ímillum føroyskan og íslendskan sjógv – ella øvut, sigur hann.

### Órógvandi veiða

Rólant sigur, at felagið Línuskip ikki kann prógva, at nakað óregluligt fer fram hjá norskum línubátum undir Føroyum, men hann heldur tað vera órógvandi, at norsku skipini kunnu skifta millum føroyskan sjógv og ES-sjógv á sama túri.

- Vit síggja javnan norsk línuskip liggja ímillum føroysku línuskipini og fiska – og teir siga seg tá fiska brosmu og longu. Vit siga ikki, at tølini hjá teimum eru skeiv, men okkum dámar avgjørt ikki hesa skipan, leggur hann aftrat.

Í øllum førum staðfestir formaðurin í Línuskipum, at norðmenn síggja stórt í at sleppa undir Føroyar at royna.

- Hvørt ár iggja teir klárir longu millum jól og nýggjárs at koma higar at royna, og tað er ikki av ongum, heldur Rólant.

Hann heldur, at føroysku línuskipini avgjørt áttu at sloppið út á djúpari vatn, tá ið nógvar av línuleiðunum eru stongdar um várarnar.

- Men tá er ikki roynandi á hesum leiðum fyri norsku línubátunum, sigur hann.

Rólant Poulsen sigur seg hava skilt, at eftirlitið við norsku línubátunum í føroyskum sjógvi er økt.

- Men tað man vera rímiliga torført hjá myndugleikunum í eini handavending at staðfesta, hvat er í eini frystilast við eini 20-30 kuldastigum, sigur formaðurin í Línuskipum.

# Toftamenn hava nú keypt Morgunstjørnuna

**Línuskipið, Morgunstjørnan, hevur skift heimstað og er vorðin ein partur av línuskipaflotanum hjá toftamonnum**

EIGARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið, Morgunstjørnan, sum P/F Múlavík á Eiði hevur átt, hevur aftur skift eigara.

Tað vóru Kristian Julius Jacobsen og Rólant Poulsen, sum áttu Morgunstjørnuna, men fyri einum ári síðan seldi Rólant síni partabrøv í felagnum til Kristian Julius, sum síðan einsamallur hevur átt felagið, P/F Múlavík.

### Toftamenn keypa

Nú hevur Kristian so avgjørt at selja toftamonnum við Jóhannesi Olsen, sum eigur felagið P/F Eysturoy og línuskipini, Eysturoying og Sigmund, felagið Múlavík.

Kristian Julius Jacobsen og Rólant Poulsen áttu Morgunstjørnuna og Vesturland, sum Thor í Hósvík keypti fyri umleið trimum árum síðan.

Nú hevur so Morgunstjørnan eisini skift heimstað og er vorðin ein partur av línuskipaflotanum hjá toftamonnum.